Landssjúkrahúsið:

# Stríðið um føðideildina er harðnað

**Sjúkrarøktarfrøðingar góðtaka undir ongum umstøðum, at ein ljósmóður skal vera leiðari á eini deild, har sjúk pinkubørn og sjúkar barnakonur liggja og krevja serkøna røkt**

UMLEGGINGAR Á FØÐIDEILDINI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Úrslitið av umleggingunum á føðideildini á Landssjúkrahúsinum er uppaftur verri enn upprunaliga uppleggi var, sigur felagið fyri Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar. Her er nevndin í felagnum*

– Stríðið um føðideildina á landssjúkrahúsinum er heilt avgjørt ikki av.

Forkvinnan í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar er rættiliga greið, tá ið vit spurdu hana, hvat hon sigur til, at leiðslan á Landssúkrahúsinum nú hevur gjørt av at seta umstríddu umleggingarnar á føðideildini í verk.

Sjúkrarøktarfrøðingarnir hava alla tíðina sagt, at teir góðtaka undir ongum umstøðum, at tað fakøkið, sum eitur sjúkrarøkt, verður tikið frá sjúkrarøktarfrøðingunum og lagt undir ljósmøðurnar.

Kortini avgjørdi leiðslan á Landssjúkrahúsinum hósdagin, at umleggingarnar verða settar í verk, helst frá 1. mai at rokna.

Men tað, sum rættiliga hevur fingið bikarið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum at flóta yvir, er, at tað eru eisini gjørdar kollveltandi broytingar í sjálvari leiðsluni á føðideildini.

Higartil hevur ein sjúkrarøktarfrøðingur verið leiðari á føðideildini.

Men tað er alt broytt, so at tað nú verður ein ljósmóður, sum verður ovasti leiðari á føðideildini.

Men undir henni skulu so sita tveir tveir javntsettir undirleiðarar leiðarar, nevniliga ein sjúkrarøktarfrøðingur og ein ljósmóður.

– Vit kunnu undir ongum umstøðum góðtaka, at ein ljósmóður verður leiðari á eini neonatalari deild, sigur Jana H. Dalsgaard, forkvinna í Felagnum Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar.

Ein neonatal deild, er ein deild, har sjúkar barnakonur og sjúk pinkubørn liggja. hesi hava brúk fyri nágreiniligari røkt og tí er tað als ongin ivi um, at leiðarin skal vera sjúkrarøktarfrøðingur, tí sjúkrarøkt er serøkið hjá sjúkrarøktarfrøðingum.

ana H. Dalsgaard, sigur, at støðan á føðideildini er nú tann, at leiðandi sjúkrarøktarfrøðingurin er lækkaður í tign, samstundis sum at ljósmóður hevur yvirtikið leiðarastarvið.

Samstundis eru ein sjúkrarøktarfrøðingur og ein ljósmóður javntsettir undirleiðarar.

– Hetta merkir, at sjkúkrarøktarfrøðin er í greiðum minniluta í leiðsluni og tað góðtaka vit undir ongum umstøðum.

## Ongin sparing

Forkvinnan í Felagnum føroyskir sjúkarøktarfrøðingar sigur, at umleggingin ber í sær, at tað nú verða tríggir leiðarar í skipanina, har tað áður vóru tveir.

Tað er eisini greitt, at ætlanin er, at ósett størv og komandi leys røktarstørv, verða ikki sett aftur.

– Her er talan um størv til sjúkrarøktarfrøðingar. Samstundis kann longu staðfestast, at tríggir sjúkrarøktarfrøðingar eru longu farnir úr starvi og fryktandi er fyri, at enn fleiri fara.

– Sostatt sær svart út fyri røktarfakliga førleikanum á føðideildini, sigur Jana. H. Dalsgaard.

Hon sigur, at Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar stendur sostatt fast við sínar útsagnir herfyri um, at umleggingin á føðideildini á Landssjúkrahúsinum fer at seta trygdina hja sjúkum pinkubørnum og sjúkum barnakonum í vanda.

– Í veruleikanum er úrslitið av umleggingunum á føðideildini uppafturverri enn lagt varð upp til í fyrstuni, tí nú er sjúkrarøktarfakligi leiðarin lækkaður í tign, eins og deildin er við at verða drenað fyri sjúkrarøktarfrøðinar, sigur forkvinnan í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Hon tvíheldur eisini um, at talan er ikki um nakra sparing, tí nú eru tríggir leiðarar, har tað frammanundan vóru tveir, samstundis sum ljósmøður fáa hægri løn enn sjúkrarøktarfrøðingarnir.

---

Avgerðin tikin:

# Um ein mánað verður føðideildin umskipað

**Stjórin á Landssjúkrahúsinum sigur, at nógv umstríddu umleggingarnar á føðideildini verða settar í verk og hann vónar at tað kann gerast um ein mánað**

UMLEGGINGAR Á FØÐIDEILDINI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*–Vit fara at gera okkara ítarsta fyri at fáa arbeiðið á føðideildini at ganga so væl sum gjørligt, sigur Poul Geert Hansen,stjóri á Landssjúkrahúsinum*

Tað er nú greitt, at føðideildin á Landssjúkrahúsinum verður umskipað, soleiðis sum leiðslan hevur ætlað.

Sostatt er tað eisini greitt, at harðligu mótmælini frá sjúkrarøktarfrøðingunum rinu ikki við leiðsluna á Landssjúkrahúsinum.

Poul Geert Hansen, stjóri á Landssjúkrahúsinum, sigur, at gongst sum ætlað, verða umleggingarnar settar í verk 1. mai.

Hann sigur, at endamálið við umleggingunum er at fáa eina betri góðsku og samanhang í samlaðu tænastuna hjá føðideildini og ljósmøðraskipanina og samstundis fáa ein meiri rationellan rakstur av deildunum.

– Ongi røktarstarvsfólk verða søgd upp, men ósett og komandi leys størv, verða ikki sett aftur fyrrenn vit eru komin niður á starvsfólkatalið sum ætlað.

Hann sigur, at leiðslan á samanløgdu deildini verður skipað soleiðis at bæði sjúkrarøktarfakliga og ljósmóðurfakliga økið er væl umboðað.

– Leiðarastørvini verða fyribils sett fyrstu syftu, men áðrenn eitt ár er farið, verða tey lýst leys.

Leiðarin skal vera antin ljósmóður, sjúkrarøktarfrøðingur ella ein við báðum útbúgvingunum.

Í hesum sambandi kann viðmerkjast, at Annika Hoydal, ljósmóður, er sett-ur sum ovasti leiðari á føðideildini.

Undir henni eru so tveir javntsettir millumleiðarar settir. Sólfríða Helmsdal, sum varð leiðari á føðideildini, er lækkað í tign og er nú settur millumleiðari fyri røktarfakliga økið og JoanVang, ljósmóður, sum er settur undirleiðari fyri ljósmóðurfakliga økið.

Poul Geert Hansen sigur, at nú fer leiðslan á Landssjúkrahúsinum at leggja til rættis út í æsir, hvussu arbeiðið á føðideildini skal skipast

– Vit leggja stóran dent á, at hetta verður væl skipað, so at øll starvsfólk verða tikin við í tilrættaleggingina og kunnu føla seg trygg. Vit fara eisini at leggja nógva orka í at samansjóða starvsfólkini, soleiðis at tey sum skjótast kunnu kenna seg, sum hoyrandi til eina og somu deild.

Poul Geert Hansen sigur, at ætlanin er at spara 1,7 millión um árið við hesi umleggingini. Samstundis skulu 5,6 ársverk av sjúkrarøktarfrøðingum sigast úr starvi og ljósmøður yvirtaka størvini.

Felagið Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar meta, at hetta svarar til átta sjúkrarøktarfrøðingar, tí tað eru so nógv, sum arbeiða hálva tíð og 3/4 tíð.

Poul Geert Hansein heldur, at tað er væl skilligt, at sjúkrarøktarfrøðingarnir kenna seg ótryggar, tí tað er ikki óvanligt, tá ið umleggingar verða gjørdir á einum arbeiðsplássi.

– Men vit fara at gera okkara ítarsta fyri at fáa umleggingarnar at ganga so væl sum gjørligt.

---

## Ljósmøðurnar fingu sín vilja

**Tað er greitt at ein orsøk til umleggingarnar á føðideildini, er at ganga ynskjum frá ljósmøðrunm á møti**

UMLEGGINGIN Á FØÐIDEILDINI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Orsøkin til umleggingarnar á føðideildini á Landssjúkrahúsinum, er, at fáa eina betri góðsku og samanhang í samlaðu tænastuna hjá føðideildini og ljósmøðraskipanina og samstundis fáa ein meiri rationellan rakstur av deildunum.

Tað er almenna frágreiðingin frá leiðsluni á sjúkrahúsinum til, hví føðideildin skal umskipast.

Men tað er eisini greitt, at umleggingarnar verða gjørdar eftir ynski frá ljósmøðrunum.

– Tað hevur leiðslan á Landssjúkrahúsinum beinleiðis váttað fyri okkum, sigur Jana H. Dalsgaard, forkvinna í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Almenna orsøkin til ynskið frá ljósmøðruum er, at tær vilja sleppa at fylgja sjúklingatilgongdini frá byrjan til enda fyri sostatt at styrkja samanhangin í viðgerðini.

Jana H. Dalsgaard vísir eisini á, at í eini grein í Sosialinum herfyri, skrivaði nevndin í Ljósmøðrafelagi Føroya, at tær vilja fegnar taka sær av røktini av barsilskvinnum og nýføðingum.

Harafturat ger forkvinnan í ljósmøðrafelagnum greitt í samrøðu við Dimmalætting longu 30. august í fjør, heilt greitt, at ljósmøðurnar fara ikki at góðtaka at arbeiða á føðideildini undir einum sjúkrarøktarfrøðingi sum leiðara.

– Nú er so ein umlegging framd, sum til fulnar gongur ljósmøðrunum á møti. Tær eru komnar inn á deildina at arbeiða, samstundis sum sjúkrarøktarfrøðingurin er koyrdur frá sum leiðari og ljósmóður sett ístaðin, sigur Jana H.Dalsgaard.